## Drápsmaður í Svøríki

Svenska løgreglan hevur tikið ein mann, sum er undir illgruna fyri at hava framt tvey morð, og serbisku myndugleikarnir vilja vera við, at hann var uppií, tá serbiski forsætisráðharrin, Zoran Djindjic, varð myrdur tann 12. mars.

Svenska løgreglan vil ikki almannakunngera, hvør tann tikni maðurin er, men serbiska sjónvarpið segði í gjár, at maðurin eitur Darko Milosevic, og at hann er limur í brotsmannabólkinum Zemun, sum er lagdur undir at hava myrt Djindjic. Tað vil svenska løgreglan ikki vátta, men hon viðgongur, at maðurin varð tikin eftir áheitan frá serbisku løgregluni.

Serbisku myndugleikarnir leita framvegis eftir 14 limum í Zemun. Teirra millum er Milorad Lukovic, sum verður hildin at vera maðurin, sum skipaði fyri morðinum í Beograd grækarismessudag.

## Brúka meiri oljupengar

Norsku stjórnini tørvar meiri pengar til fíggjarlógina, og tí ætlar Per-Kristian Foss, fíggjarmálaráðharri, at fara longur niður í oljugrunnin, enn vanligt hevur verið.

Tá verandi fíggjarlóg varð endurskoðað fyri fýra mánaðum síðani, valdi stjórnin at taka sjey milliardir krónur úr oljugrunninum, og sambært blaðnum Aftenposten ætlar hon nú at taka tíggju milliardir krónur afturat til fíggjarlógina næsta ár. Sambært blaðnum heldur stjórnin hetta vera ráðiligt, tí altjóða búskaparvøksturin, sum hevur víst seg í seinastuni, fer at økja virðið á virðisbrøvunum hjá grunninum og harvið eisini vinningin.

Sambært Aftenposten væntar stjórnin, at meiri pengar úr oljugrunninum til fíggjarlógina fara at hava gagnliga ávirkan á norska búskapin, soleiðis at tað ikki verður neyðugt at taka so nógvar pengar úr grunninum í 2005 ella í 2006. Tá fer tað økta virðið á virðisbrøvum grunsins eisini at gera, at tað, sum er nýtt ov nógv nú, er vunnið innaftur, heldur stjórnin.

## Lumpa kvinnur til Evropa

Eitt blað í teilendska høvuðsstaðnum Bangkok vil vera við, at nógvar teilendskar kvinnur verða lumpaðar til Evropa.

Bangkok Post skrivar, at kvinnurnar verða serliga lumpaðar at fara til Týsklands, men at nógvar eisini verða lumpaðar at fara til Fraklands, Bretlands, Sveits, Niðurlond og til Danmarkar. Upplýsingarnar hevur blaðið frá teilendska uttanríkisráðnum. Sambært Bangkok Post enda nógv tær flestu í skøkjuhúsum.

Men nógv bendir eisini á, at túsundtals ungar teilendskar kvinnur verða lumpaðar til Japan. Uttanríkisráðið veit um 33.000 teilendskar kvinnur, sum eru farnar til Japan, og at 27.000 teirraeru enn í landinum, sjálvt um tær ikki hava loyvi at vera har longur. Bara 6.000 hava fingið longt uppihaldsloyvi frá japansku myndugleikunum.

## Onga øl við róðrið

Myndugleikarnir í avstralska landspartinum New South Wales hava gjørt av at herða ferðslureglurnar.

Higartil hava fólk, sum koyra bil, havt loyvi at hava eina øl í aðrari hondini at sløkkja tostan við, treytað av at alkoholpromillan ikki fer upp um 0,5. Men nú gongur tað ikki longur, og tey, sum bróta ta nýggju regluna, kunnu vænta sær einar 1200 krónur í bót. Um orsøkina til lógarbroytingina siga myndugleikarnir í New South Wales, at hagtølini vísa, at rúsdrekka er uppi í fimta hvørjum ferðsluóhappi í landspartinum.

– Tað ber ikki til at varðveita ta gomlu regluna, tí hon samsvarar als ikki við ta vanligu uppfatanina longur. Tað ber ikki til, at fólk koyra við aðrari hondini og drekka við hinari, sigur samferðslumálaráðharrin, Carl Scully.

**UTTAN ÚR HEIMI**

*Mánadagin helt Bush røðu í sambandi við amerikanska arbeiðaradagin. Har mátti hann viðganga, at 2,7 milliónir arbeiðspláss eru horvin í USA, síðani hann tók við. Men amerikanarar vilja eisini hava hann at siga sannleikan um hersetingina í Irak.*



# Vilja hava Bush at siga sannleikan um Irak

**Í USA bera fólk ótta fyri, at átrúnaðarligt stríð kann bresta á í Irak, og at tað fer at elva til stórar trupulleikar fyri USA. Tey vilja nú hava forsetan at siga sannleikan um støðuna.**

USA

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Eitt stríð millum sunni- og shiamuslimarnar í Irak fer at kosta USA dýrt, bæði í mannalívum og pengum, afturat teimum trupulleikum, sum amerikanararnir longu hava í Irak.

Nú um dagarnar skrivaði viðmerkjarin hjá Time Magazine, Joe Klein, at hersetingin í Irak er tann størsta kreppan hjá USA síðani kríggið í Vietnam.

– At taka seg úr Irak nú er eingin loysn. Sigurin sýnist vera langt burturi, og útreiðslurnar veksa við rúkandi ferð, skrivaði hann.

Nógvir amerikanarar hava hug at taka undir við Joe Klein, men uppaftur fleiri eru stúrin, tí tað eru fjølmiðlafólk og ymsir serfrøðingar, sum siga teimum frá viðurskiftunum í Irak og ikki teir leiðandi politikararnir. Eitt nú var tað varauttanríkisráðharrin, Richard Armitage, sum segði, at USA fer at lata ST fáa størri ávirkan í Irak. Og tað var umsitingarleiðarin í Irak, Paul Bremer, sum segði, at hersetingin og endurbyggingin fara at kosta amerikonsku skattgjaldarunum tíggjutals milliardir dollarar.

– Tørvurin verður so stórur, at tað ber ikki til at gera ov nógv av, segði Paul Bremer.

Amerikanski generalurin Abizaid, sum er ovasti fyri amerikonsku hermonnunum í Irak, hevur eisini sagt, at tørvur verður á fleiri hermonnum í Irak, samstundis sum yvirmenn hansara í Pentagon søgdu, at USA fer ikki at senda fleiri hermenn hagar. Sama ábending er komin frá embætismonnum í Hvítu Húsunum.

Men teir hægstu politikararnir siga einki. Har er tøgn, og tað hevur fingið fleiri av floksfeløgunum hjá George W. Bush, forseta at gera vart við seg. Teir vilja hava forsetan at siga sannleikan um hersetingina.

Republikanski senatorurin John McCain skrivaði í einari grein í Washington Post sunnudagin, at uppgávan í Irak er ov týdningarmikil, til at hon kann fara fyri bakka. Hann bað inniliga forsetan siga amerikanska fólkinum, hvat tað fer at kosta, skal tiltakið eydnast. Og tað eigur forsetin at gera, áðrenn tað er ov seint, legði hann afturat.

Ein annar kendur republikanskur senatorur, Richard Luger, sum er formaður í uttanríkispolitisku nevndini hjá senatinum, hevur sagt, at tað fer at kosta minst 30 milliardir dollarar at endurbyggja Irak. Hansara ráð til stjórnina eru at biðja ST um hjálp. Tað noyðast vit, sigur hann.

Bæði eygleiðarar og politikarar í Washington leggja stjórnina hjá Bush undir at hava undirmett uppgávuna í Irak stórliga.

Endin á einari viðmerking, sum stóð í New York Times nú um dagarnar lýsir væl hugsanina hjá amerikanarum í hesum døgum:

– Eg veit ikki, hvat Bush, forseti hevur gjørt í síni summarfrí, men eg veit, hvat amerikanararnir hava gjørt. Teir eru farnir at stúra, skrivaði greinskrivarin.






Visiónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 181 fólk á 21 deildum kring um í landinum. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á starvsfólkadeildini, Yviri við Strond 2, starvast 3 fólk.

**Starvsfólkaleiðari við hugsjónum**

Vit sóknast eftir nýggjum starvsfólkaleiðara, nú dugnaligi starvfólkaleiðari okkara hevur tikið við nýggjum avbjóðingum.

Nýggi starvsfólkaleiðarin gerst partur av einari fyritøku við visiónum og málum á starvsfólkaøkinum. Bæði starvsfólk og leiðarar hava seinastu árini verið í einari víðfevndari menningartilgongd.

Virkni starvsfólkapolitikkurin hevur stóran týdning soleiðis, at Sparikassin framhaldandi varðveitir og dregur dugnalig starvsfólk til sín. Starvsfólkini skulu støðugt mennast, so Sparikassin eisini í framtíðini megnar at veita kundunum framúr góða fakliga og persónliga ráðgeving.

Trivnaður og arbeiðsgleði millum starvsfólkini hevur eisini avgerandi týdning fyri Sparikassan, og á hesum økjum skal starvsfólkaleiðarin vera virkin.

Fyri at røkka hesum málum krevst ein góður og sjálvstøðugur starvsfólkaleiðari við menniskjakunnleika og áhuga fyri starvsfólkaviðurskiftum, og sum dugir væl at fáast við fólk. Innlit í Human Ressource Management – gagnnýtslu av starvsfólkaførleikum – er gott grundstøði.

Evnini at samstarva, samskifta og lurta mugu vera góð. Vit ynskja okkum eina eldsál, ið eggjar øðrum til og torir at ganga á odda. Stundum krevst eisini av starvsfólkaleiðaranum, at hann loysir ósemjur, og til tess krevst dirvi, innlit og oftani eisini humor.

Starvsfólkaleiðarin er sparringspartnari hjá stjórnini, deildarleiðarum og starvsfólkum í Føroya Sparikassa, og hann vísir beinleiðis til stjórnina.

Nakrar fyrisitingarligar uppgávur liggja eisini hjá starvsfólkaleiðaranum, m.a. setan og útbúgving av starvsfólkum, lønarútgjalding og frítíðaruppgerðir. Á Starvsfólkadeildini starvast trý fólk, leiðarin íroknaður.

Starvið verður lønt sambært avtalu.

Áhugað eru vælkomin at venda sær til Bjarna Olsen, stjóra, á telefon 348575 ella á telduposti bjarni.olsen@sparikassin.fo.

Umsóknir skulu vera Sparikassanum í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 16. september 2003. Tær skulu stílast til:

FØROYA SPARIKASSI
Att.: Bjarni Olsen, stjóri
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

REPROZ







**Náttarvaktur á Hotel Hafnia**

Vit sóknast eftir tilkomnum fólki til fast starv sum náttarvakt - at byrja sum skjótast.

Talan er um parttíðararbeiðið *(uml. 113 tímar pr. mánað).*

**Arbeiðsuppgávur:**

- Vaktarhald av hotellinum
- Kundatænasta
- Telefonavgreiðsla
- Ávist roknskapararbeiðið
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Arbeiðið krevur at tú:**

- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Ert fyrikomandi

Tú ert vælkomin at ringja og fáa nærri at vita, við at ringja tlf. 31 32 33 og tosa við Ásu Johnsdóttir.

**P/F HOTEL HAFNIA**
Áarvegur 4-10
Fo-100 Tórshavn
Tlf. 31 32 33 Fax 31 52 50
E-mail: hafnia@hafnia.fo







www.sosialurin.fo